## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tekniski Skúlin í Tórshavn:

# Seks bygningssnikkarar fingið prógv



*Fríggjadagin 18. mars 2005 fingu seks bygningssnikkarar prógv á Tekniska Skúlanum í Havn, f.v.: Allan Djurhuus, Streymnes, Bjarni á Hólalagi, Hvalba, Frits Eið, Hellur, Janus á Húsagarði, Skálavík, Ólavur Guttesen, Sandavágur, Oluf Reinert Djurhuus, innan Glyvur.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Øssur Mohr við á páskaframsýning



**Saman við sjey øðrum listafólkum er Øssur Mohr listamaður í Fuglafirði við á eini páskaframsýning á Fussingsø Slot í Randers**

Undir heitinum "Fra syd til nord" hevur Fussingsøgruppen boðið átta kendum listafólkum frá Fraklandi, Danmark, Føroyum og Íslandi við á eina listaframsýning á Fussingsø Slot í sambandi við at hetta er 10. árið á rað at framsýningin er á páskum. Talan er sostatt um eina jubilemsframsýning.

Á framsýningini eru t.d. oljumálningar, vatnlitsmyndir, og skurðmyndir úr keramik og bronsu. Listafólkini hava øll hvørt fyri seg fyrr havt ymiskar framsýningar bæði í Danmark og uttanlands.

Umframt listamannin Øssur Mohr úr Fuglafirði luttaka listafólkini: Lise Blaabjerg, Frakland, Ingrid Hamburger, Danmark, Ulla Bille, Danmark, Helle Bang, Danmark, Ole Bade, Danmark, Hanne Højfeldt, og Bjarni Sigurdsson, Danmark (føddur í Íslandi).

Ferniseringin var leygardagin 19. mars 2005. Framsýningin er annars opin soleiðis: Hósdagin 24. mars til mánadagin 28. mars, og leygardagin 2. og sunnudagin 3. apríl, allar dagar frá kl. 10-16. Adressan er: Fussingsø Slot, Vasevej 9, Fussingsø ved Ålum, DK-8900 Randers.

### Dagurin

**22. mars. Páll biskupur**, deyður umleið ár 250. Talan er ikki um ápostulin, men um ein biskup í Narbonne í Fraklandi við sama navni. Er eitt av teimum fyrstu dømunum um ein biskup, sum ikki doyði blóðvitnisdeyðan.

### 80 ára føðingardagur

Hósdagin 24 mars fyllir Elly Magnussen Tvøroyri 80 ár.

Hon er burturstødd føðingardagin

### Silvurbrúdleyp

Týsdagin 22. mars hava hjúnini Turid og Benno Drangá silvurbrúdleyp.

Brúdleypsadressan er: Brønbjerg 11, Østerild, 7700 Thisted, tlf. 004525612261.

Tordis Mohr og Arni Gunnarsson hava silvurbrúdleyp týsdagin 22. mars.

Tey eru burturstødd.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum mintust okkum á gullbrúðleypsdegnum tann 19. februar 2005.
Tøkk fyri gávur, telegrammir og uppringingar, bæði her í Føroyum og úr útlandinum eins og av skipi.
Tøkk til tykkum mongu, sum stukku inn á gólvið og settu tykkara serstaka dám á dagin og gjørdu hann ógloymandi fyri okkum. Eisini ein tøkk til tykkum mongu, sum á ymiskan hátt rættu eina hjálpandi hond í samband við gullbrúðleyp okkara.
Ein serlig tøkk til børn, svigarbørn og ommu- og abbabørn fyri at tit gjørdu tað møguligt at halda dagin á ein slíkan hátíðarliga hátt.
Gleðiligar páskir øll somul.

**Bestu heilsanir**
**Margretha og Jóhan Jákup Gullaksen**
**Klaksvík**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá okkara elskaði maður, pápi, verfaðir og abbi

**Kjartan Hansen**
**í Garðinum**

fór heim til Harran.

Takk fyri blómur, kransar og gávur til Akurin og øll tit, sum fylgdu honum.

Heilsan við 1. Tess., 4, 16-18.

*Vegna familjuna*
**Ranvá**